FUGLAFJARÐAR BÝRÁÐ

# STARV

## SUM HAVNAMEISTARI VIÐ FUGLAFJARÐAR HAVN

Starvið sum havnameistari við Fuglafjarðar havn verður hervið lýst leyst at seta tann 01. november 2008 ella so skjótt sum til ber eftir hetta.

**Starvið:**
Tú kemur í starvinum at hava leiðsluna av Fuglafjarðar havn, sum umframt havnameistaran hevur 2 havnaumsjónarmenn í føstum starvi.

**Førleikakrøv:**
Útbúgving sum skipsførari, førleika í enskum máli í skrift og talu, somuleiðis sum tú skalt duga at orða teg væl bæði munnliga og skrivliga, hava teldukunnleika og kunnleika til nýmótans leiðsluamboð.

**Vit bjóða tær:**
Eitt spennandi og sjálvstøðugt starv, har tú sum leiðari umframt dagligu leiðsluna, eisini kemur at verða við til og menna havnina, sum seinastu árini hevur verið í støðugum vøkstri, og sum ídag telist millum størstu havnir í landinum.

**Setanarviðurskifti:**
Starvið verður fyribils lønt sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya (KAF) og Føroya Skipara- og navigatørfelag fyri havnameistarar, somuleiðis sum skrivligur sáttmáli eisini verður gjørdur partanna millum um arbeiðstreytir vm.

Fyrsta árið verður at rokna sum royndarár.

**Hava tygum áhuga**
so eru tygum vælkomin at senda skrivliga umsókn saman við prógvum og møguligum CV og viðmælum til Fuglafjarðar býráð, Postboks 30, 530 Fuglafjørður, og skal henda verða ráðnum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 12. september 2008 kl. 15.00.

**Fleiri upplýsningar**
fáast við at venda sær til Sigurð S. Simonsen, borgarstjóra á telefon 737777 ella Jákup Frants Larsen, býráðsskrivara á telefon 737702.

Býráðið skilar sær rætt til at velja millum umsóknirnar ella onga at taka.

*Fuglafjørður, tann 21. august 2008*

**Fuglafjarðar býráð**

---

# Íbúð ynskist

Íbúð ynskist til leigu í Havn frá 1. desember til eldri mann. Eri friðarligur og fari væl um.

Ring á tlf. 211322

---

# Hús til sølu á Tvøroyri

Um nøktandi boð verður givið, verða húsini við Sílá 33 seld.

Stykki er 505 m², húsini eru Bygd 1952, í 2 hæddum uml. 75 m².

**Í ovastu hæddini er** gangur, køkur, baðiverilsi, 2 stovur og 3 kømur.

**Í kjallarahæddini er** vaski-/og arbeiðsrúm, 2 kømur og gangur.

Húsini liggja væl fyri, við sera góðum útsýni.

**Áhugaði kunnu ringja**
**tlf. 225656-317451 284112**

---

## Frítíðar / familju bátur til sølu

Riviera 925 - flybridge version, árg ´96.
10,25 m langur, 3,20 breiður, 90 cm dýpd.
Allar hentleikar - so sum kaffimaskina, køliskáp, kókiplátur, oljufýr, wc / brúsa, bóvskrúva, el akker, o.a.
8 sitipláss, 5 sovipláss - 2 kømur
motor: 1 volvo penta, kad300, 285 HK, árg ´06 - siglt 275 tímar
Báturin hevur skaða og kann síggjast eftir avtalu eins og á www.huseklepp.net.
nývirði 1.775.000 kr - marknaðarvirði ístandgjørdur ca. 1.200.000 kr.
**- selist fyri nøktandi boð.**

**Um áhugi, so ring 229654**

---

**Suðuroyar Sjúkrahús**
FO-800 Tvøroyri
Tlf: 34 33 00 · Fax: 37 11 42
E-mail: ssh@ssh.fo

## Sjúkrahúsarbeiðari / portørur

Eitt starv sum sjúkrahúsarbeiðari (portørur) er leyst til setan frá 1. novembur 2008.

Eisini verður søkt eftir avloysara fyri portør í farloyvi frá 1. novembur 2008 til 1. septembur 2010.

Portørdeildin er ein deild við nógvum ymiskum uppgávum m.a. bráðfangishjálp í samband við lívbjargandi arbeiði, flutning av sjúkum og skaddum fólkum. Eisini hevur portørdeildin ábyrgd av øllum portørarbeiði á sjúkrahúsinum, og setir hetta stór krøv til starvsfólk, ið mangan arbeiða undir serliga strongdum umstøðum.

Tann, ið settur verður kemur at arbeiða í skiftandi vaktum við tilkallivakt frá heiminum. Neyðug upplæring verður givin á sjúkrahúsinum.

Løn og setanartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Havnar Arbeiðsmanna-felag.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til Birgir Dimon telefon 34 33 00 lokal 3230.

Umsóknir skulu sendast til:

Suðuroyar Sjúkrahús
att. umsjónarmaðurin
Sjúkrahúsbrekkan 19
800 Tvøroyri

ella

ssh@ssh.fo

Umsóknarfreist: 22. septembur 2008.

---

# Stuðul til Frítíðar-ansingina í Leirvík

Søkt verður eftir stuðli til barn við autismu. Talan er um 20 t./ viku.

Talan er um tíðaravmarkað starv fyri starvsfólk í barnsburðarfarloyvi, at byrja uml. 15. september 2008 til 15. juli 2009.

**Søkt verður eftir stuðli sum:**
- undir ábyrgd leiðslunnar og í tøttum samstarvi við foreldur og starvsfólk er við til at skapa eitt trygt og mennandi umhvørvi fyri barnið.
- dugir at samstarva / samskifta og er fyrikomandi.
- er fúsur at taka á seg tær uppgávur og halda fram við tí arbeiðsgongd, ið er virkandi (teacch)
- er stundisligur og nærlagdur.

**Førleikar:**
Ynskiligt er, at tann, sum settur verður, hevur námsfrøðiliga útbúgving ella samsvarandi førleika.

Fyrimunur er eisini, um umsøkjarin hevur royndir at arbeiða við børnum við autismu.

**Lønar - og setanartreytir:**
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Umsóknir við prógvum, Cv og møguligur viðmælum skulu

Sendast til :
Leirvíkar Kommunu
Stílað: Frítíðaransingin
Kulibakki 15
520 Leirvík

Umsóknarfreist: mikudagin 3. september 2008

Nærri kunning um starvið, fæst við at ringja til Leiðaran á tlf. 743125.

**Leirvíkar Kommuna**
**Kulibakki 15 · Postrúm 42**
**FO-520 Leirvík · Tlf.: 44 30 06**
**leirvik@leirvik.fo · www.leirvik.fo**

---

Zarepta



# Vælkomin í Zarepta

**Hesar vikuskiftislegur verða í Zarepta í september:**

**Lega fyri 18 ár og eldri** frá fríggjadegi 05.09. til sunnudagin 07.09. Kostnaður kr. 400,00

**Kvinnustevna** frá fríggjadegi 12.09. til sunnudagin 14.09. Kostnaður kr. 450,00

**Mansstevna** frá fríggjadegi 19.09. til sunnudagin 21.09. Kostnaður kr. 450,00

**Tekning á tlf. 332140 ella 282140 og fax nr. 333141.**